## Hvalur oyðileggur gørnini

Nógvir grønlendskir fiskimenn velja at fiska tosk við gørnum, hóast fakfelagið og myndugleikarnir heldur vilja hava teir at leggja um til línu. Men í seinastuni eru nógvar kúlubøkur komnar inn á firðirnar, og tað er vorðið dýrt hjá garnamonnunum, tí hvalurin oyðileggur gørnini, sigur KNR. Málið er vorðið so mikið álvarssamt, at tað kemur í Landstingið í næstu viku. Tá kemur uppskot um at veita monnum, sum missa gørn, endurgjald.



## Menn arbeiða fleiri tímar

Íslendsk hagtøl vísa, at har arbeiða menninir fleiri tímar enn kvinnurnar. Ein uppgerð fyri triðja ársfjórðing í ár vísir, at í meðal arbeiddu menninir 47,6 tímar um vikuna og kvinnurnar 37,4 tímar. Verður hugt at teimum, sum arbeiddu parttíð, var myndin tann øvugta, 23,9 tímar hjá monnum og 26,9 tímar hjá kvinnum. Tølini vísa, at í triðja ársfjórðingi arbeiddu bæði menn og kvinnur heldur færri tímar enn í sama ársfjórðingi í 2006.

# Føroyar verða eitt valdømi

**Alt tíður nú uppá, at Føroyar verða eitt valdømi innan næstu tíggju dagarnar. - Sokallaða semjan snúði seg um, at vit formenn skuldu royna at arbeiða politiskt í flokkunum við at ávirka og mýkja baklandið. Tá hetta ikki eydnaðist, var semjan ikki til longur, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**



*- Eg haldi, at Marjus Dam skuldi sett revolvaran í hylki aftur, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsflokksins*



*- Semjan hvíldi á, at politiska arbeiðið úti í flokkunum eydnaðist, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Broytingaruppskotið, har roynt verður at útseta spurningin um eitt valdømi til eftir valgið, sær nú av álvara út til at vera farið í søguna.

Tað hevur leingi verið greitt, at samgongulimir ikki vóru so heitir fyri broytingaruppskotinum, sum formenninir í samgonguni royndu at fáa meiriluta fyri, eftir at tingmenn í august hóttu við at slíta samgonguna, varð uppskotið um eitt valdømi viðgjørt.

Eisini hevur stór ógreiða verið um sokallaðu semjuna, sum formenninir gjørdu, og hvat hendan møguliga semjan snúði seg um. Marjus Dam úr Sambandsflokkinum róði í útvarpinum í gjár uppundir, at formaður hansara, Kaj Leo Johannesen, hevur brotið eina semju um at bíða við einum valdømi til eftir valgið.

Men Kaj Leo Johannesen er ikki samdur við Marjus Dam um, hvat hendan semjan fevndi um.

- Tað undarliga við hesum er, at tey sum ikki vóru við á fundinum vita hvat kom fram tá, sigur Kaj Leo Johannesen. Hann vísir á, at nógv umrøddi kreppufundurin í august viðgjørdi politisku støðuna, og hvørjar avleiðingar hon kundi hava við sær. Eisini sigur hann seg vera samdan við løgmann, tá hesin við Sosialin sigur, at semjan bara snúði seg um, at vit formenn skuldu royna eina loysn, sum gekk út uppá at arbeiða politiskt í flokkunum við at ávirka og mýkja baklandið.

– Men eg segði fleiri ferðir, at eg kundi ikki svara fyri tingmenn okkara, tí ongin kann noyða nakran til at atkvøða eitt ávíst, sigur Kaj Leo Johannesen, sum eisini sigur seg vera troyttan av revolvarapolitikkinum hjá Marjus Dam.

- Spurningurin er, um ikki Marjus Dam skuldi sett revolvaran í hylki aftur, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Mýking miseydnaðist

Jóannes Eidesgaard sigur seg nú rokna við, at uppskotið hjá Edmundi Joensen verður samtykt. Hetta merkir, at Føroyar verða eitt valdømi innan tíggju dagar.

- Semjan hvíldi á, at politiska arbeiðið úti í flokkunum eydnaðist. At formenninir skulu fara út og royna at ávirka baklandið, sum hevði við sær, at fólk kundu atkvøða fyri at eitt valdømi kom í gildi aftaná valgið. Um hetta arbeiðið ikki eydnaðist, so var sjálvandi ongin semja, tí vit kunnu ikki noyða fólk at atkvøða eftir okkara høvdi. Hetta bleiv ein trupulleiki, tá ið fólk fóru út og hóttu við at slíta samgonguna, og bara tí fór eg upp í málið og royndi at finna ein útveg, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

### Verður samtykt

Tá Sosialurin ringdi runt til tinglimirnar herfyri, varð greitt, at 19 tinglimir eru fyri einum valdømi, og at 12 vóru ímóti. Ein vildi ikki svara. Eftir ætlan skuldu formenninir royna at fáa fólk at ganga við til at bíða við einum valdømi til eftir valgið, men av tí at hendan royndin miseydnaðist, er mest sannlíkt, at uppskotið um eitt valdømi beinanvegin, sum kemur til 2. viðgerð týsdagin, verður samtykt.

### FAKTA

Í spurnarumfarum, sum vit gjørdu herfyri, vóru 19 tinglimir fyri og 12 ímóti at skipa Føroyar sum eitt valdømi.

**Fyri og ímóti einum valdømi**

**Ja**
Óli Breckmann
Poul Michelsen
Heðin Zachariasen
Edmund Joensen
Kaj Leo Johannesen
Lisbeth L. Petersen
Olav Enomoto
Johan Dahl
Andrias Petersen
John Johannessen
Annita á Fríðriksmørk
Heidi Petersen
Tórbjørn Jacobsen
Finnur Helmsdal
Høgni Hoydal
Karsten Hansen
Bill Justinussen
Jenis av Rana
Kári P. Højgaard

**Nei**
Anfinn Kallsberg
Jógvan við Keldu
Jørgen Niclasen
Kjartan Joensen
Alfred Olsen
Marjus Dam
Gerhard Lognberg
Kristian Magnussen
Vilhelm Johannesen
Sverre Midjord
Páll á Reynatúgvu
Hergeir Nielsen

**Vil ikki svara**
Henrik Old

# Vánaligt at turka av upp á danir

**Tað er hugstoytt, at samgongan ikki stendur saman um Kyoto-avtaluna, og tað er ov vánaligt, at Fólkaflokkurin nú roynir at turka ábyrgdina av upp á danir, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**

KYOTO-AVTALA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Løgmaður heldur lítið um úttalilsini hjá Jørgeni Niclasen, formanni í Fólkaflokkinum, um Kyoto-avtaluna.

- Tað er hugstoytt, at samgongan ikki stendur øksl við øksl í hesum máli. Tá heilir 26 tinglimir atkvøddu fyri at avtaka fyrivarni móti Kyoto-avtaluni, so roknaði eg við, at teir tóku heilhjartaðir undir við málinum. Nú skilji eg, at summir hava bara atkvøtt fyri við hálvum hjarta, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann sigur, at hann tók tað sum givið, at tá tingfólk tóku undir við uppskotinum var tað í teirri vissu, at tey vistu, at hetta kravdi eitt arbeiði fyri umhvørvinum, og at mann var til reiðar at spenna seg út at gera hetta arbeiði.

- Kyoto-avtalan merkir, at vit skulu gera eitt ordiligt arbeiði fyri umhvørvinum, og tað er ikki gott, um tingfólk ikki hava gáa um hetta undan atkvøðugreiðsluni og bara hava atkvøtt fyri, til tess at kunna pynta seg við, at fyrivarni er burtur, sigur løgmaður.

Hann vísir á, at tað er ikki rætt, tá Jørgen Niclasen førir fram, at danir bert hava bundið seg til at minka um útlátið við 8%. Talan er í veruleikanum um 21%.

- Tá tosað verður um at samráðast við danir, so er tað væl fyri at sleppa bíligari. Um ætlanin er, at vit til dømis skulu fáa okkara prosentsats niður á 4%, skulu danir so økja sín upp á 25%? Eg haldi í hvussu er tað er ov bíligt at turka hetta av upp á danir, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Kundu lagt ætlan

Løgmaður sigur, at tá Jørgen Niclasen spyr eftir ítøkiligum ætlanum, so hevur hann forstáilsi fyri tí. Sálvandi hevði tað verið upp á sítt pláss við slíkum ætlanum. Men hann heldur ikki, at tað er nakað »must«.

- Hinvegin skulu vit heldur ikki gloyma, at tað er Fólkaflokkurin, sum seinastu árini hevur umsitið umhvørvismál, og tað hevur staðið teimum frítt at gjørt ætlanir viðvíkjandi umhvørvinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Í løtuni er einasta ætlan viðvíkjandi umhvørvinum hon, sum liggur í orkupolitikkinum hjá Vinnumálaráðnum, men løgmaður vísir á, at vit nú hava eina serfrøðingastovu, sum júst er ætlað at koma við ætlanum um, hvussu vit verja umhvørvið.

- Tað skuldi einki verið til hindurs fyri, at farið undir tað arbeiði, sum skal til, fyri at ganga krøvunum í Kyoto-sáttmálanum á møti. Tað hava vit stundir til. Í hvussu er haldi eg ikki tað er rætt, at turka hendan trupulleikan av upp á danir, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.